Sosialurin



# Tróndar andi livir enn



**Tað verður nógv gjørt burtur úr Tróndi í Gøtu í hesum døgum. Eitt tiltak er útgáva av bók um Gøtuskeggjar, sum gøtumaðurin Sigfríður Joensen hevur skrivað. Her verður greitt frá samtíðini hjá Tróndi og um Trónd sjálvan. Eisini verður greitt frá tí, sum kann sigast um hansara ætt bæði í Føroyum og Íslandi**



*Jógvan saman við konuni Marin Sofíu og børnunum Onnu Sofíu, Johan Heina og Einar í fanginum á mammuni*

**BÓKAÚTGÁVA**
*Óli Jacobsen*
*olij@sosialurin.fo*

Bókin varð løgd fram á samkomu í húsunum hjá Gøtu Forminnisfelag, Glyvra Hanusarhús, sunnudagin kl. 17. Norðragøtumaðurin Óli í Tjørnustovu úr grannalagnum hjá Tróndi í Gøtu hevði eina framløgu, har hann millum annað segði:

Eg vil takka fyri høvið at siga nakað í samband við framløguna av bókini um gøtuskeggjar. Hetta geri eg við serligari gleði. Eg og Sigfríður eru javngamlir og kennast tí væl, og eg ynskja Sigfríð og annars okkum øllum tillukku við hesi bók, sum væl og virðiliga lýsir hendan partin av gøtu- og føroyasøgu.

Eg fari ikki sum so at endurgeva stórvegis úr bókini. Tað haldi eg, at fólk eiga at hava til góðar. Hetta verður nakrar hugleiðingar, sum eru falnir mær inn, síðan eg fekk hesa uppgávu hósdagin. Hesar snúgva seg um, at Tróndar andi livir enn.

## Tróndarandi

Eg havi gingið í Gøtu skúla saman við Sigfríð, megin-partin av tíðini í sama flokki. Lærarar tá vóru Jákup Simonsen, Poul Enok Hansen og Helga Øregaard. Tey lærdu okkum ikki bert at lesa og skriva, men eisini tær dygdir, sum kravdust víðari í lívinum. Her vóru vit hvønn dag mint á Gøtu Trónd av innskriftini í nýggja skúla, sum vit kallaðu hann, "Guð sjái hluta minn." Hetta mann hava verið við til at skapa áhuga fyri hesum mæta manni. Sjálvur eri eg uppvaksin í túninum í gomlu Norðragøtu við einum hanagleivi yvir á Tróndargrund.

Sjálvur havi eg arbeitt eitt sindur við Gøtu søgu í 20. øld. Sigast kann, at her hava búð rættuligir pressarar. Vit kunnu bara hugsað um gamla lærara, Símun Paula í Konoy, sum hevur uppdrigið fleiri ættarlið av gøtufólki. Í hansara tíð gjørdist eitt blómandi mentanarligt og politiskt umhvørvi í sóknini. Eitt úrslit var, at fiskimenn í Gøtu í 1910 tóku stig til at stovna Føroya Fiskimannafelag, sum fleiri tíðarskeið hevur havt stóran týdning fyri menningina av okkara samfelag. Konoy var samstundis formaður í FF og Lærarafelagnum. Umframt hevði hann mong onnur álitisstørv, eisini sum tingmaður.

Í hesum húsi vit eru stødd, Glyvra Hanusar húsi, var í 1903 føddur Hans Jacob Havsteym, eitt tað fremsta politiska begávilsi, vit hava havt. Men hann gekk burtur bert 28 ára gamal í 1932 við Immanuel. Hann gav uttan iva íblástur til Jákup Frederik Øregaard, sum kom at umboða Eysturoynna og Gøtu á tingi 1940-1978. Øregaard kom at hava stóran týdning fyri sóknina.

## Eingin kreppa í Gøtu

Hetta er ikki minst galdandi fyri vinnulívið. Meðan tosað verður um kreppu í fiskivinnuni aðra staðni í Føroyum, so er eingin kreppa í Gøtu. Skipini koyra enn hampiliga væl, og hetta er ikki minni galdandi fyri virkini á landi, meðan onnur stór virki í landinum liggja tungt í sjónum. Uttan at fara at útgreina tað nærri her kann sigast, at orsøkin er, at her hava vit havt menn, sum hava dugað at taka rættar avgerðir til rætta tíð. Teir hava dugað at halda høvdið kalt, tá ið aðrir ikki hava evnað tað.

Tróndarandin er so eisini galdandi fyri menningina av skipaflotanum í Gøtu. Tað byrjaði ikki væl við Tulip fyri 100 árum síðani. Hon hvarv við mann og mús sama ár, hon var keypt.

Síðan hava verið nógv skip. Tvey hava kallast Tróndur í Gøtu. Hjá tí fyrra gekk hvørki betri ella verri enn hjá øðrum líknandi trolarum. Hjá tí seinna gekk sum kunnugt nógv betri.

Víst hava verið bakkøst bæði á landi og sjógvi, men Gøta hevur havt menn, sum ikki hava fallið í fátt, og sum hava bart seg upp undan aftur.



*Sigfríður greiðir frá bókini*

## Oddfríður ein eftirkomari hjá Tróndi

Serliga stuttligt er at lesa um eftirkomarar hjá Tróndi. Hóast neyvan nakað kann skjalprógvast eru her áhugaverdar ábendingar.

Sambært Sigfríð var Líggjas í Jørundstovu í Norðragøtu ein eftirkomari hjá Tróndi. Ein dóttir hansara var Sára, sum giftist við Jóan Paula Gregersen. Eitt av teirra børnum teirra er Oddfríður. Haldi eisini, at júst Oddfríður og hansara synir eru góð ímynd av tí Tróndaranda, sum ger Gøtu til helst fremstu bygd í landinum. Teir gera tað kortini ikki sum høvdingar, eins og Tróndur kundi gera tað, men saman við bygdarfólkinum, sum følir seg at eiga lut í virkseminum.

## Olmussan sum gav úrslit

Tað er eisini áhugavert at lesa um gomlu ættina á Lækjuni í Syðrugøtu. Her hava verið Tróndar og Trondesen í fleiri ættarlið við greiðum ábendingum til ættarfaðirin Trónd í Gøtu. Her verður millum annað greitt frá, at á Lækjuni búðu í 1870 bóndin Jógvan Trondesen og kona hansara Anna Sofia Øre. Tey eiga tá fimm børn. Eitt av hesum kallaðist Tróndur. Her býr eisini haldbóndin Tróndur Joensen. Tey einastu, sum eru eftir av hesi ættini er tann hjá dótrini Maria Frederikka, hvørs ætt endaði á Viðareiði.

Tá eg kom norð til Norðragøtu hóskvøldið fór eg av tilvild og vana at hyggja at gravsteinum uttanfyri gomlu kirkju. Her liggja tveir niðurdotnir gravsteinar. Skriftin var ikki løtt at lesa, men í fyrsta umfari sást Trondesen navnið á honum. Fór so at kanna hetta eitt sindur og kom fram til eina áhugverda søgu júst um hesa ættina.

Á øðrum steininum stendur:

HER HVILER EN TROFAST OG KÆRLIG
HUSTRU OG MODER
JOHANNE SOFIE
JOENSEN
F. TRONDESEN
F. 27.2. 1870
D. 24.9.1904
OG DØDFØDT
PIGEBARN HVILENDE I
SIN MODERS ARME

ALTID I MODGANG
SAGTMODIG DU VAR
MODGANGENS DAG
TAALMODIG DU BAR
DERFOR HERREN I
HIMLEN DIG LØNNE
DU FRYDES BLANDT
ENGLENE SKØNNE

ELSKET OG ÆRET
VÆRE HENDES MINDE

Innskriftin gav varhugan av eini syrgiligari lagnu. Kvinnan var bert 34 ára gomul og var deyð í barsilssong. Í bókini sæst, at hetta var dóttir Jógvan Trondesen Men hon var gift Joensen. Her máttu teir lokalu serfrøðingarnir spyrjast, og tað varð skjótt at greiða fekst á hesum.

Maður Johannu Sofíu var Joen ella Jógvan hjá Gamla Heina í Syðrugøtu. Hann giftist upp aftur við Marin Sofíu hjá Duritu úr Norðragøtu. Teirra fyrsti sonur Johan Heini man vera uppkallaður eftir Johannu Sofíu og abbanum Heina. Tey fingu eisini sonin Einar, sum fekk sær Tróndargjógv til eftirnavn.

Tá hugsað verður um "einglar góðir" hjá Tróndi er tað hugvekjandi, at gravskrivtin vísir til "engle skønne".

Hin gravsteinurin hevur hesa innskrift:

HER HVILER
OLIVIA MARIA
MAGDALENE
SUSANNE JOENSEN
F. 30. AUGUST 1897
D. 17. FEBRUAR 1901

OLIVIA MARIA
MAGDALENE
SUSANNE JOENSEN
F. 30. OKTOBER 1902
D. 31. MARTS 1904
ELSKET OG SAVNET AF
SINE FORÆLDRE
HERREN GAV HERREN
TOG HERRENS NAVN
VÆRE LOVET

Hetta eru tvær døtur hjá Jógvan og Johannu Sofía, sum eru deyðar undan henni. Sum tað sæst hava báðar sama navn, og er tann seinna tískil fult út uppkallað eftir teirri fyrru. Hetta merkir, at Jógvan árini 1904 missir konu og tvær døtur umframt, at tey hava mista eina dóttir í 1901.

Men ein dóttir Anna Sofía f. 1900 livdi eftir. Hon var líkamliga veik og pápin hevur helst óttast fyri, at hon fór at fáa somu lagnu sum sínar systrar.

Jógvan lovaði tískil eina ljósakrúnu í olmussu til kirkjuna, um Onnu Sofíu varð lív lagað. Bønin varð hoyrd, tí hóast sín líkamliga veikleika manglaði Onnu Sofíu bert nakrar fáar dagar í at gerast 100 ár. Henda ljósakrúnan er tann mittasta í skipinum í gomlu kirkju í Norðragøtu. Sagt verður, at Anna Sofía hevði testamenterað sínar ognir til Gøtu kirkju. Hon kom annars alla sína tíð at vera hjá Weihefólkinum í Søldarfirði.

Tískil "lívir" Tróndarnavnið enn á hesum eina gravsteini, har tey seinastu av hesi Tróndarættini í Gøtu eru jarðað.

Umframt at vera eitt klípi til Tróndarsøgu er hetta eis-



*Ljósakrúnan, sum Heina Jógvan gav kirkjuni, um Gud vildi spara lívið á dótrini Onnu Sofíu. Hon gjørdist nærum 100 ár.*